

## Nýggj hús í miðbýnum til sølu

Nýggj hús í miðbýnum, Nólsoyar Páls gøta 6, í 3 hæddum 3 x 50 $m^2$. Grundøki: 125 $m^2$. Húsini eru innrættaði sum 3 íbúðir á 50 $m^2$, ein á hvørji hædd.

Húsini eru BD60 brandbjálvað ímillum íbúðirnar, væl bjálvað og ventilarað við »luft til vatn« hitaanleggi. Húsini liggja í hugnaligum umhvørvi.

Kann seljast sum stakar íbúðir ella sum heil hús.

**Ring og spyr/frætt á tlf. 28 40 10 / 21 04 03**

Sí myndir av íbúðunum á www.123hjemmeside.dk/frifra

## Lýsing um brævatkvøður, valkort og valstað til kommunuvalið og skúlastýrisvalið í Funnings kommunu 11. november 2008

**BRÆVATKVØÐUR**
Veljarar í Funnings kommunu, ið sambært vallógina lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða hjá bygdarráðsformanninum til og við 10. november 2008.

Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðið, kunnu boða bygdarráðsformanninum frá á tlf. 270547 í seinasta lagi 10. november 2008 kl. 16.00.

**VALKORT**
Við hesum verður gjørt kunnugt, at til kommunuvalið verða valkort send øllum veljarum í kommununi.

Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt bygdarráðsformanninum frá í seinasta lagi 10. november 2008 á tlf. 270547.

**VALSTAÐIÐ í Funnings kommunu til kommunuvalið og skúlastýrisvalið 11. november 2008 er á kommunuskrivstovuni í Funnings skúla:** Atkvøðugreiðslan byrjar KL. 10.00 fyrrapart og heldur fram til KL.20.00 – ELLA SO LEINGI VELJARAR MØTA UTTAN STEÐG.

**Funnings Bygdarráð**

## Jólasølustevna

**Jólasølustevna verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 29. november.**

**Tey, sum ynskja bás/pláss, kunnu ringja til 211600 ella 211490**

**Bygdarfelagið Glæman**

Runavíkar Kommuna

## Lýsing um brævatkvøður, valkort og valstøðini til kommunuvalið og skúlastýrisvalið í Runavíkar kommunu 11. november 2008

**BRÆVATKVØÐUR**
Veljarar í Runavíkar kommunu, ið sambært vallógina lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við 10. november 2008.

Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðið, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 417000 í seinasta lagi 10. november 2008 kl. 16.00.

**VALKORT**
Við hesum verður gjørt kunnugt, at til kommunuvalið verða valkort send øllum veljarum í kommununi.

Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt býráðsskrivstovuni frá í seinasta lagi 10. november 2008 á tlf. 417000

**VALSTØÐINI í Runavíkar kommunu til kommunuvalið og skúlastýrisvalið 11. november 2008:**

Fyri valstaðið í Runavík í Ítróttarhøllini í Runavík fyri bygdirnar: Skipanes, Søldarfjørður, Lamba, Lambareiði, Glyvrar, Saltangará, Runavík, Rituvík og Æðuvík.

Fyri valstaðið á Skála fer fram í pensionistahúsinum á Skála fyri bygdina: Skála

Fyri valstaðið í Skálafirði í skúlanum í Skálafirði fyri bygdina: Skálafjørður

Fyri valstaðið í Oyndarfirði í skúlanum í Oyndarfirði fyri bygdina: Oyndarfjørður

Fyri valstaðið í Elduvík í skúlanum í Elduvík fyri bygdina: Elduvík

Fyri valstaðið Funningsfirði í skúlanum í Funningsfirði fyri bygdina: Funningsfjørður

**Atkvøðugreiðslan byrjar KL. 10.00 fyrrapart og heldur fram til KL.20.00 – ELLA SO LEINGI VELJARAR MØTA UTTAN STEÐG.**

**Runavíkar Býráð**



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**

## Broyting í byggisamtyktini fyri Kvívík

Sambært grein 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. maj 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Kvívíkar bygdarráð á fundi 27. oktober 2008 hevur gjørt av broyting í byggisamtyktini fyri Kvívík.

Ætlaða broytingin í almennu byggisamtyktini er at regulera F-øki og B-øki Frammi í Forná í Kvívík.

Broytingin fevnir um partar av matr. nr. 180a, 150, 249, 252a, 259, 260, 269 og 276 í Kvívík.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina, liggur frammi á kommunuskrivstovuni frá mánadegi 3. november til 24. november 2008.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða send Kvívíkar Kommunu skrivliga í seinasta lagi 3. februar 2009.

**Kvívíkar Kommuna**

**Víkavegur 4**
**FO-340 Kvívík**



**Rúslinjan**
**svarar á telefon 31 85 86**

> Telefonráðgeving
> Anonymitet
> Tagnarskyldu
> Stundir at lurta

Bláa Krossur
www.blakross.fo



**Lesið Sosialin so eru tit við**